# Upplýsing er vegurin fram

**Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið , sum nú er til viðgerð, er eitt uppskot komið frá landsstýriskvinnuni í mentamálum, Annitu á Fríðriksmørk, har hon skjýtur upp at niðurleggja Filmseftirlitið og heldur leggja dent á tað upplýsandi, fyribyrgjandi arbeiðið**

FILMSEFTIRLITIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Vit hava valt at skjóta upp at avtaka Filmseftirlitið, tí at tann moralski sensururin, sum tey áseta er nógv øktur seinastu árini, sigur Annita á Fríðriksmørk, landsstýriskvinna í mentamálum.

Hon greiðir frá, at við tað at útboðið gjøgnum parabolir, internetið og telduspøl er vorðið so nógv og harvið nærum óavmarkað, so er tað greitt, at hesin tørvurin má og eigur at verða dekkaður á ein annan hátt.

Og hetta heldur Annita kann gerast við at leggja dent á upplýsingararbeiðið.

– Vit mugu upplýsa børnum og foreldrum teirra vandarnir við hesum, sigur hon.

Hon og Bill Justinussen, landsstýrismaður, hava tosað um at koyra hesa uppgávuna yvir á Fyribyrgingarráðið, sum verður umsitið av Bill. Kostnaðurin av hesum arbeiðinum er ikki endaliga uppgjørdur enn, váttar Annita á Fríðriksmørk tó.

Annita viðgongur samstundis, at tað eru pengar at spara á Fíggjarlógini á hesum økinum, men talan er bert um 360.000 krónur, so hon sigur, at tað ikki var tað, sum fyrst og fremst var drívmegin handan hetta uppskotið.

### Dupultarbeiði

Annita vísir á, at filmarnir, sum koma til landið - tað veri seg antin í biografarnar ella sum videofilmar – longu frammanundan hava eitt aldursmark. Og tískil heldur hon, at talan er um dupultarbeiði, tá Filmseftirlitið setur aldursmark á filmar, sum longu hava tað frammanundan. Og tað dugir hon ikki at síggja nakra orsøk til.

Birgir Kruse:

# Burturvið at avtaka Filmseftirlitið

**Birgir Kruse heldur, at tað er púra burturvið at avtaka Filmseftirlitið, og hann heldur, at tað er løgið, at føroyingar fara at taka seg burtur úr einum øki, har øll okkara grannalond er kend um allan heimin fyri at vera í fremstu røð**

FILMSEFTIRLITIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Birgir Kruse, sum er PD í samskifti við høvuðsdenti á børn og talgildar miðlar, var 1984-92 formaður í Filmsfelagnum. Í mong ár hevur hann undirvíst børnum og ungum á miðlaøkinum og fyri Tórshavnar kommunu legði hann til rættis eina miðlabreyt á Eysturskúlanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Birgir Kruse heldur, at tað er púra burturvið, at Filmseftirlitið verður tikið burtur. Hann heldur, at Føroyar við hesum fara at taka seg burtur frá einum øki, sum grannalond okkara í nógv, nógv størri mun taka aktivt lut í.

– Norðanlond eru kend kring allan heimin fyri at vera millum tey fremstu, tá tað kemur til gransking av nettupp børnum, og hvussu tey verða ávirkað av fjølmiðlum, og tí er tað heilt burtur við, at politikarar í Føroyum ætla at avtaka tað arbeiðið, sum verður gjørt á hesum økinum, sigur hann. Birgir hevur pedagogiska diplomeksamiu í samskifti við høvuðsdenti á børn og talgildar miðlar. Frá 1984 til 92 var hann formaður í Filmsfelagnum, og hevur hann í mong ár undirvíst ungum í og við fjølmiðlum. Tað er landsstýriskvinnan í mentamálum, Annita á Fríðriksmørk, sum leggur hetta uppskotið fram. Tað ger hon, tí hon heldur, at børn og ung í dag hava nógv størri og breiðari møguleikar til at koma fram at tílíkum enn fyrr.

Og hon heldur, at tað átti heldur at verðið upplýst meira um vandarnar við hesum.

### Upplýsing kostar eisini

Birgir Kruse spyr fyrst og fremst um, hvussu landsstýriskvinnan ætlar, at upplýsing skal veitast, tá man niðurleggur alla játtanina til hetta økið.

Hann vísir á, at upplýsingararbeiðið so sanniliga eisini kostar pengar, og tá ongir eru játtaðir til endamálið, dugir hann illa at síggja, hvussu hetta skal kunna hanga saman.

– Vit melda okkum stutt sagt úr heimssamfelagnum við at gera so, sigur Birgir. Og hann skilir ikki, at nakar kann halda, at tað at leggja játtanina burtur, kann á nakran hátt bøta um støðuna, sum hon er í dag. Tvørturímóti, heldur hann, at tað sindrið, sum verður gjørt í dag gjøgnum Filmseftirlitið, bøtir um.

Birgir er sannførdur um, at hetta er tað sama sum at siga, at tað arbeiðið, sum higartil hevur verðið gjørt ígjøgnum Filmseftirlitið, ikki ger mun.

– Og hetta er samstundis snøgt sagt at halda alt granskingar- og upplýsingararbeiði fyri gjøldur, heldur hann.

### Ung duga væl

Birgir Kruse var skúlaárið 1999/2000 á Danmarks Pædagogiske Universitet, har hann tók fýra lærugreinar um júst evnið børn og fjølmiðlar. Hann gjørdi tá eina kanning við støði í einum sjeynda flokki í Vestmanna skúla, har hann kannaði, hvussu tey dugdu at arbeiða, samskifta og ferðast á internetinum.

Niðurstøða hansara útfrá hesi kanning var, at børn duga ómetaliga væl at ferðast í "cyberspace". Og at samskifta og orða seg á netinum.

Vegleiðarin hjá Birgiri á universitetinum segði, at hendan kanningin var tann størsta og mest útgreinað, sum hon nakrantíð hevði sæð, og tískil metti hon, at hon var sera eftirfarandi.

Birgir tosar somuleiðis um sokallaðar avleggarar av Filmseftirlitsarbeiðinum í grannalondunum hjá okkum. Hann greiðir frá, at í Danmark er ein felagsskapur, sum eitur Medierådet for Børn og Unge og í Svøríki eitt "voldsskildringssekreteriat", sum senda út bóklingar, har greitt verður frá gongdini í øllum granskingararbeiðinum innan børn og fjølmiðlar.

Og ST-stovnurin UNESCO hevur valt Gøteborg sum heimstað fyri eini altjóða granskingarstovu, sum einans kannar viðurskiftini millum børn og harðskap á filmi, video og teldu.

– So Filmseftirlitið í dag er ikki so nógv at seta bann, men heldur at upplýsa í eini tíð, har vit fyrst og fremst frá almennari síðu mugu duga at sansa samtíðina og síðani at meta um ta ávirkan, sum kemur úr øllum ættum – fyrst og fremst til størstu brúkarabólkarnar, sum nettupp eru børn og ung, sigur Birgir.

– Norðurlendsku dømini, eru bert fá dømi, hvussu aktiv grannalond okkara eru á hesum økinum. Og har er nógv at nevna afturat. Hetta økið, sum vit, um Filmseftirlitið verður avtikið, melda okkum burturúr, er greiða niðurstøðan hjá Birgiri Kruse útfrá ætlanunum hjá Annitu á Fríðriksmørk, landsstýriskvinnu.

Sostatt eru ymsar meiningar um, hvørs tað er rætt at avtaka Filmseftirlitið. Men í verandi stund kunnu vit bert staðfesta, at tað liggur eitt uppskot á borðinum um at avtaka tað, og at ætlanin er, at Fyribyrgingarráðið skal gera upplýsingararbeiðið. Um tað so fer at enda við, at Føroyar detta langt aftur um okkara grannalond á hesum økinum, sum Birgir Kruse er bangin fyri, ella tað fer at betra um støðuna á økinum - tað kann bara tíðin vísa.





*Pápar skuldu rinda tvífalt fyri børn, sum búgva hjá mammuni*

*Tilvildarlig mynd*

# Skerdur stuðul kann raka børnini

**Tað sparir landinum pening. Pápar fara at gjalda meira, og í síðsta enda kann tað føra við sær, at upphæddin til barnapengar fer at lækka. Páll á Reynatúgvu landsstýrismaður roynir enn einaferð at taka stuðulin til uppihaldspening av**

BARNAPENGAR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Komandi ár verður tvífalt so dýrt hjá pápum at eiga børn, sum ikki búgva heima.

Tað er avleiðingin av lógaruppskoti, sum Páll á Reynatúgvu landsstýrismaður hevur lagt fyri løgtingið. Sostatt ger hann eina roynd afturat at taka stuðulin til uppihaldspening av. Seinast gekk illa, tí ein av hansara egnu atkvøddi ímóti, og við tepra meirilutanum hjá samgonguni koppaði atkvøðugreiðslan til fyrimuns fyri andstøðuna, sum øll er ímóti.

Finnur Helmsdal, ið tá var á tingi sum varamaður, er farin úr politikki, og tí er Rói Egholm komin á ting sum varamaður í hansara stað. Tískil skuldu líkindini verið góð fyri, at tað hesaferð fer at eydnast Pálli á Reynatúgvu at fáa uppskotið ígjøgnum.

Uppskotið fer sostatt at kosta pápunum, sum eiga børn uttan fyri sítt heim. Higartil hava teir fingið helvtina av útreiðslunum til síni børn endurgoldnar, og tað er tann stuðulin, sum dettur burtur. Men tað fer eisini at raka tey, sum fáa uppihaldspeningin. Tað vil siga mammurnar, ið eru um børnini, og í síðsta enda børnini, sum peningurin er ætlaður til.

Økið verður umsitið av donskum myndugleikum, og Ríkisumboðið og Civildirektoratet hava fingið tað til ummælis. Tey hava gjørt greitt, at lógaruppskotið fer at hava við sær, at nýggjar vegleiðingar fyri áseting av uppihaldspeningi til hjúnafelagar og børn undir 18 ár verða gjørdar fyri Føroyar soleiðis, at ásetingin fer at lækka.

– Tað ger seg serliga galdandi fyri áseting av uppihaldspeningi til hjúnafelagar og eitt lækkað barnagjald. Hetta merkir, at tey, ið fáa uppihaldspening, verða verri fyri fíggjarliga – hvussu nógv er óvist, sigur Páll á Reynatúgvu í viðmerking til uppskotið.

Uppskotið hevur annars við sær eina beinleiðis sparing fyri landskassan á umleið 8 milliónir krónur árliga, sum longu eru íroknaðar fíggjarlógaruppskotið fyri 2004.

Metta útreiðslan í 2003 er 7,8 mió kr. Útreiðslurnar til stuðul til uppihaldspening kunnu tó gerast nógv størri í 2003, um fleiri uppihaldsskyldug velja at gjalda eftirstøðu sína nú, meðan tey hava ein lógarfestan rætt til at fáa stuðul til uppihaldspening. Eftirstøðan av barnapeningi, veittur í forskoti, var 36,6 milliónir krónur tann 1. oktober 2002.

Um øll eftirstøðan varð afturgoldin nú, og øll uppihaldsskyldug høvdu søkt um stuðul til uppihaldspening, áðrenn ov seint var, høvdu útreiðslurnar á hesi kontu í 2003 kanska hækkað við 18 milliónir krónur. Mett verður kortini ikki, at hetta er sannlíkt, av tí at tølini fyri 2003 ikki vísa stóra hækking í útreiðslunum, hóast ætlanin hevur verið at avtaka lógina um uppihaldspening í 2003.

Sambært uppskotinum dettur uppihaldsstuðulin burtur frá 1. januar 2004.




GSM FRÍTÍÐ

| | Teletíð | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovnan | 300,-* | 0,- |
| Mánaðargjald | 0,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 3 kr/min | 2,25 kr/min |
| Samrøður - kvøld | 2 kr/min | 0,75 kr/min |
| SMS-boð | 0,75 | 0,50 |

*íroknað kr. 100,- talutíð

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum